# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Ein heilsan til Hildigunn og Mortan Johannesen á 70 ára døgunum



Ávikavist 10. juli og 13. juli fylla hjúnini Hildigunn og Mortan Johannesen 70 ár. Hildigunn er úr Skálavík og er dóttir Helenu og Niels Holm Nicodemussen. Pápi hennara varð ofta nevndur Niels á Hamri. Mortan búði síni barnaár nakað í Havn og nakað í Klaksvík, og hann er sonur Alexandru og Kaj Johannesen. Pápi hansara var tann elsti av hvannasundsbrøðrunum.

Nakað av jørð hoyrdi til barnaheimið hjá Hildigunn. Nógv arbeiði var at gera har, so sum at hoyggja, røkta neyt, húsligt arbeiði o.s. fr., og her lá parturin hjá Hildigunn ikki eftir. Seinni fór hon burtur at arbeiða. Hon var m.a. í húsplássi í Vági, í Íslandi, arbeiddi á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, í fiskaarbeiði og í handli í Havn. Seinni, í 1982, tók hon handilsskúlaprógv.

Mortan fór sum heilt ungur til skips við trolara. Hann sigldi mest saman við pápa sínum, sum var ein tiltikin trolaraskipari. Tað, sum hann lærdi har umborð av sjómansskapi og um trolarafiskiskap, kom at verða ein ómetaliga góð barlast fyri tað lívsstarv, sum hann kom at hava, bæði sum skipari og reiðari.

Síðst í 1950´unum fór Mortan á navigatiónsskúla í Havn og tók stýrimansprógv í 1960. Aftan á at hava siglt eitt sindur fór hann aftur á navigatiónsskúla og tók skipsføraraprógv í 1963. Síðani fór hann at sigla við trolarum hjá Kjølbro í Klaksvík, fyrst sum stýrimaður og so sum skipari. Hetta gjørdi hann til 1978, tá ið hann keypti sær sítt egna skip og hevur verið reiðari síðan tá. Hann kom tó at sigla sum skipari á egnum skipi í mong ár aftan á tað. Tað hevur gingið sera væl hjá Mortani við øllum hesum. Tað eru mangar fullar skipslastir av fiski, sum hann hevur ført til lands, og mangir eru teir, sum hava havt góða inntøku av at sigla við teimum skipum, sum hann hevur ført og átt.

Tað var, ímeðan tey bæði vóru í Havn síðst í 1950´unum, at tey komu at kennast og fóru at ganga saman. Í 1960 giftust tey, búsettust í Havn og fingu børnini Kaj, Niels og Helenu. Barnabørnini eru 10 í tali.

Mortan var nógv burtur við skipi, ímeðan børnini vóru smá. Hildigunn var heimagangandi og ansaði eftir húsi og børnum. Ikki er altíð lætt at vera einsamøll kona og mamma, tá ið maðurin er leingi burtur. Men hesa uppgávu gjørdi hon sær nógvan ómak við og kláraði tað væl. Tá ið Mortan keypti sær sítt egna skip fór hon beinanvegin at hjálpa honum við umsitingini av hesum virksemi og hevur gjørt tað síðani.

Hildigunn og Mortan komu sum ung til persónliga trúgv á Harran Jesus, og hava havt sítt andaliga heim í Ebenezer.

Góðu tit bæði, hjartaliga tillukku.

*N*




## Andlát og jarðarferðir

**Jastrid Olsen,** vanliga nevnd Jastrid á Toft, ættað úr Dali, búsitandi á Bornholm, andaðist í heiminum sunnudagin 8. juli 83 ára gomul.

# V4 nostalgi

**Fløgan við sangum hjá Hermanni, sum Útvarpið hevur latið framleitt, gongur sum heitt breyð**

FLØGUÚTGÁVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*25 sangir frá Hermanni Jacobsen eru á hesari serligu minnisfløguni*

Øll, sum eru so frægt til aldurs, minnast Hermann Jacobsen. Ikki minst sangir hansara, sum rungaðu í hvørjari stovu hvørt leygarkvøld, tá V4 var á skránni.

Tá varð ferðast runt landið við hesi vælumtóktu sending, sum umfram sjálvan V4-dráttin eisini innihelt skemt og spurnarkapping. Stórur partur av hesum skemti vóru sangirnir, sum millum aðrar Hermann Jacobsen sang.

Hvør minnist ikki Fossadun og Palleba ímyndaðir av Oliver Næss og Oskar Hermansen? Og hvør minnist ikki sangir sum »Per fór til Havnar« og »Tað sum vendir niður vendir upp«?

Fløgan inniheldur heilar 25 sangir, áleið helvtin av hesum frá teirri tíðini, tá Tónleikarfelagið var virkið seinast í 1950-árunum. Har eru gamlir slagarar sum Niclas hjá Pena, Sildavalsurin og Eg farvæl tær heilsi. Tveir epistlar hjá Fredman eru eisini á fløguni umfram onkur kabarettsangur, eitt nú Miðal hampa maður. Eisini eru fýra barnasangir slopnir við.

Tað er Útvarpið, sum á henda hátt hevur sýnt Hermanni, sála, heiður á hansara 65 ára degi við at geva hesa fløguna út. Bróðursonur Hermans, Tórður Jóannesarson, hevur savnað sangirnar úr goymslum í Útvarpinum og Jóannes Jakobsen hevur framleitt.

Fløgan selur ógvuliga væl, skilst á lagnum.

### Dagurin

**11. juli.** Josva. Dagurin halgaður minninum um Josva Nuns son, sum var eftirmaður Mósesar og leiddi Ísraels fólk inn í hitt fyrijáttaða landið. Sama navnið sum Jesus, Guð frelsir.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum teimum, sum við gávum, fjarritum, blómum og heilsanum á Rás 2 og við vitjan gleddu meg á 85 ára degnum.
Ein serstøk tøkk til børn míni, ið gjørdu hesa veitslu møguliga, og til onnur, ið hjálptu til.
Harrin signi tykkum øll.

*Bestu heilsanir*
**Oleva**

Lesið Sosialin